GJALDSTOVAN

# Kunning til stovnsleiðarar um tíðarfreistir o.a.

Góði stovnsleiðari

Nú 2024 skjótt er farið aftur um bak, ynskir Gjaldstovan at kunna teg um, hvussu vit kunna um tíðarfreistir o.a. í sambandi við ársskiftið.

Brúktir verða 3 miðlar í sambandi við kunning: Teldubrøv til tín, tíðindir á BSL portalinum og kunning á gjaldstovan.fo, umframt at ymis kunningarskriv o.a. somuleiðis eru á gjaldstovan.fo. Sí leinkini "Ársroknskapurin 2024" og "Roknskapargóðkenning", sum tú eigur at kunna teg við.

Undir leinkinum "Ársroknskapurin 2024" er leinkið "Listi yvir FSL mánaðarkoyringar 2025", har kunnað verður um, nær tíðarskeið verða latin aftur, og nær roknskaparútskriftir í telduposti verða sendar út. Sambært yvirlitinum er 21. februar 2025 síðsti dagur, ið stovnar kunnu skráseta á fíggjarárið 2024. Síðsta lønarkoyring viðvíkjandi fíggjarárinum 2024 verður nakrar dagar undan hesum.

Gjaldstovan fer so hvørt at kunna um, at tíðarskeið verða latin aftur og herímillum eisini um, at síðsta freist at bóka á fíggjarárið 2024 nærkast.

g.v.

Gjaldstovan

Kvíggjartún 1 | Postsmoga 2009 | FO-165 Argir | Tlf. (+298) 352400 | gjaldstovan@gjaldstovan.fo